# Tann fantastiski Íslandssáttmálin enn einaferð – størsta føroyska polittiska flopp í nýggjari tíð

ANNFINN BREKKSTEIN



Tað ljóðaði gott, at Ísland bleiv føroyskur heimamarknaður, og umvent, men nú er heilt galið, nú mistu vit eisini okkara heimamarkna til íslendingar.

Eijdisgaard, Johannesen, Kallsberg og Hoydal hava ikki ánilsi av, hvat teir hava gjørt ímóti føroya fólki við hasum ólukkuliga Hoyvíkssáttmálanum.

Vit kunnu enn einaferð staðfesta skeivleikar í Hoyvíkssáttmálanum. Nú gongur tað út yvir byggivinnuna. Í hesum tíðum er alt umráðandi at føroyskar fyritøkur eru líkastillaðar í egnum landi, men nei - enn einaferð er Hoyvíkssáttmálin ein forðing í egnum landi.

Trúgv tí um tú vilt, tí nú kunnu íslendskar fyritøkur koma her til lands at arbeiða fyri 50,00 kr. um tíman við Hoyvíkssáttmálanum í hondini og valsignilsi frá Føroya Løgtingi. – Fantastikst -

Hetta merkir at íslendingar kunnu útvega sær bíliga útlendska arbeiðsmegi úr Evropa. Tey fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Íslandi og íslendingar kunnu við Hoyvíkssáttmálanum í hondini bjóða uppá alt arbeiði í Føroyum fyri 50,00 kr. um tíman. Hetta má verða partur av visión 2015.

Hetta er vilji løgtingsins, meðan tað Føroyska vinnulívið er fari at bløða, og fólk úr byggivinnuni verða uppsøgt í hópa tali.

Arbeiðafeløgini rópa varsgóð, hetta gongur ikki, jú sigur Jørgin Niclasen, uttanríkismálaráðharri og formaður í Fólkaflokkinum, vit spara pening við hesum mátanum – enn ein fólkaflokks fidusa, tær eru nú eftir hondini ikki so fáar.

Eg fari at heita á handverkarafeløgini, arbeiðarafeløgini og verkafólk um at standa saman í hesum álvarsmáli, hetta má ikki henda í okkara landi, hetta er trælahald.

Nú mugu fólk standa saman og steðga løgtinginum, so ørskapurin við Hoyvíkssáttmálanum steðgar.

Nú mugu vit endaliga gera upp við ójavnan í Hoyvíkssáttmálanum. Um polittikarnir ikki megna tað, kann hetta enda við reinum kaosi á arbeiðsmarknaðinum, men kanska er hetta eisini partur av – visión 2015 - -eingin veit.

Áheitan á Føroya Løgting – setið Hoyvíkssáttmálan úr gildi til gagns fyri føroyingar.

# The Faroese way

ÁSA ANDREASEN



**Kæri/kæra Bjarni Djurholm, Alfred Olsen, Kári P. Hjøgaard, Heini O. Heinesen, Andrias Petersen, Bill Justinussen, Jógvan á Lakjuni, Helgi Abrahamsen, Kári Petersen, Heðin Zachariassen, Annita á Fríðriksmørk, Eyðgunn Samuelsen, John Johannesen, Rodmundur Nielsen, Karsten Hansen, Edmund Joensen, Anfinn Kallsberg, Bjørn Kalsø, Poul Michelsen, Mikkjal Sørensen, Tórbjørn Jacobsen, Jaspur Vang, Jákup Mikkelsen, Gerhard Lognberg, Vinjard Johansen og Marjus Dam**

Las tykkara lesarabræv og áheitan til Kringvarp Føroya í Sosialinum í gjár - 30. januar 2009. Helt faktiskt hin dagin, at toppurin var náddur, tá tit brúktu tíð á tingsins røðarapalli til hetta sama mál, sum lesarabrævið snýr seg um, men nei....

Eg má viðganga, at eg bleiv virkuliga ørg inn á tykkum. Eg kann ikki siga alt her, sum eg hugsaði, men tað vóru ikki penir tankar. Slett einki penir. Slapp mær av við eitt sindur av aggressiónunum á mínum Facebookprofili, har eg skjótt fekk fleiri svar, sum sannførdi meg um, at eg eri ikki einsamøll. Ein av mínum donsku vinum á Facebook spurdi meg, hvat tað var eg skrivaði um. Flóvusligt at greiða frá.

**Hvør skal stýra Kringvarpinum?**
Hvussu ber tað til, at tit meta tað verða týdningarmikið at brúka dýrabara tíð á tingsins røðarapalli, til at tosa um morgunlesturin? Tað er tað, sum eg als ikki skilji. Skilji heldur ikki, at tit skriva lesarabræv til Kringvarp Føroya. Hvussu ber tað til, at tit halda, at tit duga betur at prioritera, hvat skal á skránna hjá Kringvarpinum, enn fólk sum hava hetta til arbeiðis? Skulu politikarar ikki stýra landinum, heldur enn Kringvarpinum? Tað helt eg, men tað er sjálvsagt bara mín privata hugsan.

Í Kringvarpinum eru bæði stýrið, stjóri, programleiðari, programfólk og onnur starvsfólk. Hesi fáa ivaleyst mangar viðmerkingar um morgunlesturin, og tackla hetta, sum tey halda verða best. Við tykkara lesarabrævi, stuðla tit hugsjónini, at broytingar mugu ikki henda. Tað kundi jú hugsast, at nýggja programmið er betur og meiri undirhaldandi?

**Hvussu prioritera tit?**
Tað ringasta við øllum hesum er tó, at vit hava stórar trupulleikar her í landinum. Stórar trupulleikar. Eg kann koma í tankar um eina ørgrynnu av málum, sum áttu at havt størri prioritet hjá tykkum, enn endursendingin av morgunlestrinum. Hava tit veruliga so fá mál á skránni, at tað er pláss fyri einum slíkum máli? Ella er hetta ein væleydnað roynd at flyta fokus frá tykkara "prioriteringum" á fíggjarlógini?

Nú siga tit kanska, at ..."...Jamen, vit mugu hava loyvi at tosa og skriva um tað, sum upptekur okkum..." og at "...hetta er eitt álvarsligt mál, serliga hjá okkara gomlu ..." osfr. osfr. Ja, tað eri eg púra samd við tykkum í. Tað eigur í prinsippinum ikki at vera nakað minstamark fyri, hvat ein politikari brúkar sína tíð til. Men tá man er vitni til slíkar prioriteringar, so fer man næstan at taka undir við Bill, at man eigur at skerja talifrælsið í Føroyum, eg sigi ikki hjá hvørjum.

**The Faroese way**
Hetta er hinvegin kanska eitt gott evni at tosa við tykkara starvsfelagar uttanlands um. Eitt nú tá tit fundast um, hvussu tey ymisku londini tackla búskaparkreppuna. Tá hava tit veruliga eitt gott boð. Endursendingina av morgunlestrinum aftur á skránna, skera niður á útbúgvingar- og fólkaskúlaøkinum, droppa tilhaldini hjá teimum gomlu, tunnil til ein løgtingslim, vegstubba til onkran annan, ikki lurta eftir serfrøðingum og so annars skera niður á t.d. stovnsøkinum, sum tænir familjum og børnum, sum hava serligan tørv. The Faroese way.

Eg vil ikki hava svar upp á hetta. Tit skulu ikki brúka meiri tíð uppá morgunlesturin.

**Ps.** Eg havi lagt til merkis, at ikki allir løgtingslimir hava undirskrivað. Vón er fyri framman.

# Morgunlesturin endaður á skeivum borði

SÓLVIT NOLSØ



Kanska er avgerðin um morgunlesturin ikki væl móttikin, men tingfólk skuldu ikki blanda seg upp í avgerðirnar, ið Kringvarpið tekur.

Lat tað verða sagt beinanvegin, at summi mál burdu ongantíð endað í Løgtinginum. Tað fyrsta málið, eg hugsi um, er, hvørt vit skulu selja rundstykkir sunnudag ella ikki, og tað, sum eg hugsi næst, er morgunlestrar í Kringvarpinum. So er tað sagt. Men veruleikin er nú einaferð tann, at ofta enda mál í Løgtinginum, sum kunnu tykast at verða komin á skeivt stað, og morgunlestrar í Kringvarpinum er eitt av teimum málunum.

Nakað annað er tað, at 26 tingfólk tvinga landsstýriskvinnuna at fáa Kringvarpið at taka eina nýggja avgerð. Tað er heilt burturvið. Leiðslan má kunna taka sínar avgerðir. So kunnu tey "vanligu" geva sína meining til kennar um tiknu avgerðirnar og vísa sína ónøgd og kanska fara í dialog við Kringvarpið, men ikki er hetta komið á rætt borð, tá tingfólk fara at krevja broytingar. Kringvarpið virkar óheft av politisku skipanini, og tí skuldi Kringvarpið eisini fingið frið at tikið sínar avgerðir óheft av politiksu skipanini.

Givið er so tað, at Kringvarpið helst skuldi umhugsað tiknu avgerðina, tí tað sæst, at fólk vilja hava morgunlesturin endursendan, og vil Kringvarpið sleppa undan at missa lurtarar, so má morgunlesturin nokk skumpast framat aftur.

Kanska burdi mann lurta eftir Torbirni Jacobsen og selt Kringvarpið til hægstbjóðandi.

# Uppafturgrivin borgaralig aga-vísindi?

KÁRI LEIVSSON
yrkisfelagi



**viðmerking til vin mín Helga Rasmussen**

Í grein tíni í Sosialinum 30. januar um sálarfrøði arbeiðsloysisins gloymdist tað týdningarmesta, tá tú nevndi at ávís skeið skuldu geva arbeiðsleysum "røddina aftur": Nevniliga, at felagsligt uppbyggiligasta og sálarligt sunnasta virking av rættvísari vreiði er stættarpolitisk mobilisering. Hetta sæst tíbetur í Íslandi í dag, og varð royndur lutur undir hóparbeiðsloysinum í vesturheiminum í 1970'unum.

Eg undri meg yvir ta menniskjafatan, sum má liggja aftan fyri ta meting í grein tíni, at samfelagsligi mannarætturin arbeiði til allar hendur - snildisligt neiliga umskrivaður av tær til heitið "ósunt null-arbeiðsloysi" - verður sæddur sum ein "sjúk støða" sum skapar "degenerering av relatiónunum millum fólk" (sic!). Og tá tú so pástendur at "fólk vanvirða hvønn annan í gerandisdegnum": um nakað er vanvirðing við tað vit kunnu nevna "menniskjanáttúran", man tað vera ein slík frøðilig trúgv á at "tað ónda í mannasálini" kemur undan kavi í optimalum umstøðum.

Men - hetta er tó heilt í tráð við fordúms hugmyndafrøði sum skuldi innpota í fólk at "arbeiðsloysi er sunt" - fyri at kamuflera tann veruleika at planlagt arbeiðsloysi er eitt disiplineringsamboð hjá Kapitalinum mótvegis arbeiðandi fjøldini - eitt amboð sum smíðar í kollektivum ótta.

Eg helt annars, at henda borgaraliga kamuflasjuideologi varð deyð og jarðað av meira raffineraðum samfelagsvísindum. Men nógv bendir á at modernað vinnusálarfrøði ikki er annað og meiri enn uppafturgrivin disiplineringssálarfrøði Kapitalsins frá ídnaðarsamfelagnum í farnum øldum - í nýggjum hami sjálvandi.

Og sanniliga tragiskt, at meðan svarið við fjøldaarbeiðsloysið í 1970'unum var politisk skúling og samfelagsvirkni, er svarið hjá modernaðari vinnusálarfrøði trý áratiggir seinni: bindiklubbar til fjøldina!

Hvat meinar tú við, at "arbeiðsleys skulu fáa røddina aftur"?

Come on, Helgi.